# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur 2. s.e.trettanda:**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Lestur
***Funningsfjørður:*** kl. 17, altarg., Uni Næs. ***Talvan gongur fyri Bíbliufelagið.***
***Gøta:*** kl. 12, altarg., Martin R. Jacobsen
***Christianskirkjan:*** kl. 11 Prestavígsla og prestainnseting. ***Hans Jacob Joensen, biskupur, prestvígir Magnus Brahé Jørgensen, og Bjarni Bæk, dómpróstur, innsetur hann sum sóknarprest í Norðoya vestara prestagjaldi.***
***Vágur:*** kl. 11,
***Hov:*** kl.12 + altergang, Patrick de Neergaard
***Fámjin:*** kl. 12, altargongd, Jónsvein Bech
***Tvøroyri:*** kl. 11 Jette Paarup
***Sandvík:*** kl. 18 Jette Paarup

**Evangelisk møti í Róðrarneystinum á Argjum**
við Tórmund og fleiri.
Leygarkvøldið kl. 20 hugnakvøld við sangi og vitnisburði.
Sunnukvøldið kl. 18 evangeliskt møti. Sangluttøka: Herman og Gigga, Julius, Luddi og fleiri. Talari: Palli Højgaard. Kaffi bæði kvøldini.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikukvøldið og hóskvøldið kl. 20 felags bønarmøti í Evangeliihúsinum.
Fríggjakvøldið kl. 20 felags bønarmøti í Filadelfia.
Leygardagin kl. 10 og 13 felags bønarmøti í Filadelfia.
Sunnudagin kl. 11 felags morgunmøti í Evangeliihúsinum, kl 18 evangeliskt møti.
http://www.gospel.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Heimsbønarvika er hesa vikuna og verður bønarmøti hvørt kvøld kl. 20.
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. v/ Ukraina toyminum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18 Møti v. Regin Høgnesen
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hebron, Argir**
Mikudagin 10. januar kl. 20: Bíbliutími og bønarløta. Benny Drewsen talar.
Sunnudagin 14. januar:
Kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing
Kl. 11.30: Samvera við drekka
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli og møti.
www.hebron.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM Ten-sing kórið venur.
Hósdagin 11. januar onki í KFUK vegna bønarviku í Meinigheitshúsinum.

**Ebenezer**
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti - Evni: 1. Tess 5.
Hósdag kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night – Er í Ebenezer.
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting - Evni: 1. Tess 5,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli,
kl. 18.00 Evangeliskt møti - Evni: 1. Tess 5.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti: Sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Frá Samkomuni Lívdin á Brekku 3**
Fríggjakvøldi kl. 20.30 ungdómsmøti
***í Hoyvíkar skúla***
Sunnumorgunin kl. 10.30 sjónvarpsmøti ymisk luttaka.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti Jógvan Z. evnið er »Rómbrævið«
kl. 12 Sunnudagsskúli.
Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur.
Møtini kunnu hoyrast beinleiðis á netinum www.livdin.fo
Týskvøldið møti á Brekku 3 kl. 20, evnið er »Guds nærvera« Jógvan undirvísir og eisini verður samtala um evnið.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins guðstænasta í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins Guðstænasta í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsins Guðstænasta í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
www.katolsk.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti, sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Valdemar Simonsen evni: At hava kærleika til sannleikan í Guðs Orði, 2 partur, kl 14 sunnudagsskúli.
Mánadagin kl 17.15-18 venur barnakórið kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdag 11. jan. kl. 20 Bíbiltími við Henry D. Joensen (1.Kor. 1)
Sunnudagur 14. jan kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kára P. Højgaard, Saltangará.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudag kl. 15 Bøn.
Hósdag kl. 20 Heimaforbund fyri allar kvinnur.
Sunnudag kl. 11 møti.
Sunnudagsskúli kl. 14.
À møtinum kl. 18 talar Jørn Jørgensen, líka heim komin frá húsavígslu eftir Sunami í Sri Lanka.
Hann sínir eisini myndir umdir heitinum »En reise gjennom verden, med bakkeopphold i Sri Lanka«.
Mánadag kl. 18,30 Skótamøti.
www.frelsunarherurin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19 Delli, kl. 20 felagsbøn í Evangeliihúsinum.
Hósdagin kl. 19 Chill, kl. 20 felagsbøn í Evangeliihúsinum.
Fríggjadagin kl. 20 felagsbøn í Filadelfia.
Leygardagin kl. 9 bønardagur, kl. 21.00 Flare.
Sunnudagin kl. 11 felagsmøti í Evangeliihúsinum, kl. 11.50 felagsbarnagudstænasta.
Mánadagin kl. 20 bønarskúlin.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og sunnukvøldið kl. 18 Møti við Elsu Jacobsen.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30.
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Saron Vestmanna**
Mikudagin 10/1 bønarmøti í Saron, klokkan 20.
Hósdagin 11/1 barnaarbeiði í Saron, klokkan 19.
Sunnudagin 14/1 evangeliskt møti klokkan 18.
Mikudagin 17/1 Bønarmøti í Saron klokkan 20.
Hósdagin 18/1 Barnaarbeiði í Saron klokkan 19.
Sunnudagin 21/1 Morgunmøti við breyðbróting í Saron klokkan 11.

**Missiónsvika í missiónshúsinum í Vestmanna 9. – 14. jan. 2007**
Mikudagur kl. 20, Fólk úr Hvalvík, Streymnesi og Hósvík við talu og sangi.
Hósdagur kl. 20, Møti við Streingjakórinum úr Vágum.
Fríggjadagur kl. 20 Sylverius Jacobsen og Tórfinn Hansen av Skála, skopuningar syngja.
Leygardagur kl. 20, Hans Pauli Højgaard og Sigfred Johannesen við talu og sangi.
Innsavnan.
Sunnudagur 14. jan., kl. 14.30 Sunnudagsskúli kl. 18 Sangguðstænasta í kirkjuni við Ingu P. Dam, Kirkjukórinum, Magna Christiansen & Co og Martin Joensen.

**Aglow-Vágar**
Fundur verður í Húsmøðrahusinum í Sørvági leygardagin 13. jan. kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Vinjard Magnussen talar.

**Miðvágs Missiónshús**
Kvinnumøti verður mikukvøldið 10. januar kl. 19.30. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkominar.

**Haldórsvík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Luttøka úr Meinigheitshúsinum í Havn. Øll eru vælkomin.

**Saron Haldórsvík**
Mánadagin 15/1 húsmøti hjá Elianu og Magnus Olsen, klokkan 20.
Ver hjartaliga vælkomin,

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagur 10. januar kl. 20 Bíbiltími.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Berøa Saltangará**
Møtirøð við Poul Færø og fleiri.
Hóskvøldið 11. jan. kl. 20.
Fríggjakvøldið kl. 20.
Leygarkvøldið kl. 20.
Sunnukvøldið 14. jan. kl. 18.00.
Sunnudagin er sum vanligt kl. 11.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Rebekku Petersen.
Sunnudagin kl. 17, møti við Paula Høj, sangur við Leigh Hjaltalin. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Frá Missiónshúsinum í Gøtu**
Leygarkvøldið tann 13. januar kl. 19, verður nýggjárshugnaløta í kirkjukjallaranum í Gøtu. Snorri Brend sigur frá arbeiði í Afrika.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30.
Svenning av Lofti talar. Evni: Avbjóðingar hjá trúgvandi í tí nýggja árinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sudanringurin kemur saman týskvøldið 9. januar 2007 kl. 19. Øll eru vælkomin at vera við.

**Aglow, Eysturoy**
Møti verður í Meinigheitshúsinum á Skála leygardagin 13-1-07 kl. 15. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Skrá fyri vikuna:
Mikudagin kl.18.30 Tim 5.
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti
Hósdagin kl. 16 Liljur
Sunndagin kl. 10,30 Møti og sunnudagsskúli.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti við Poul Nicolai Steinberg.
Leygardagin kl. 10 morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14 er møti við sunnudagskúla.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunmøti.

**Kfum og Kfuk, Klaksvík**
Mikukv. kl. 20 bíbliutími evni: 1. kor. 18.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl.17.30 bønarløta, kl.18 møti.
Kl. 21 ungdómsmøti. Øll eru vælkomin. www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 Bíbliutími, Filemon.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangur, kl. 18 Møti.
Missiónsvikan verður 1.-4. mars. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mikukvøld kl. 20: Heimaforbundið. Allar kvinnur eru vælkomnar!
Hóskvøld kl. 20: Bønarløta.
Leygardag kl. 15: Andakt í Sambýlinum í Vági. Kl. 19: Nýggjársfest. Tilmelding á tlf. 373150. Øll eru vælkomin!
Sunnudag kl. 11: Einki Halgunarmøti! Kl. 14: Sunnudagsskúli. Kl. 17.30: Bønarløta. Kl.18: Evangeliskt møti. Anna Dam talar og soldátur Sigrid Ludvig leiðir.
Mánakvøld kl. 20: Bønarløta.
Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.
www.frelsunarherurin.fo

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mánadagin 8. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Enskt
kl. 14-17 Kortspæl o.o spøl
***Týsdagin 9. januar***
kl. 10-11.30 Sangløta
kl. 15 Listafólk í býlinginum »í Grønlandi«í 60-unum. Frásøgn: Marjun Sigurðsdóttir
***Mikudagin 10. januar***
kl. 10-13.30 Matgerð - Anne G. Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur - Randi Petersen, Elisabeth Andreassen
***Hósdagin 11. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 11-12 ***Lesibólkur*** - (Hvønn 1. hósdag í hvørjum mánaði. Byrja 1. februar.) Bókin: Úr køksvindeyganum, Oddvør Johansen. Samskipari: Bergljót Madsen
kl. 14-16 Boccia - Alma Poulsen

**Brúdleyp**
Leygardagin 3. feb. kl. 15.00 giftast í Hvalvíkar kirkju Gerda Árny Mortensen, Skælingur og Rúni Mortensen, Streymnes. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey í ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf: 422331 ella 421289 áðrenn 24. januar.

Leygardagin, 27. januar kl. 12 giftast í Havnar Kirkju Noomi Weihe, Lamba og Jákup Martin Joensen, Eiði. Vælkomst verður í Havnar Róðrarfelag frá kl. 14.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 15. januar hava hjúnini Elisabeth og Sten Madsen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

Mánadagin 29. januar kunnu Arngerð og Mortan Mørk, Tórshavn, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 3. februar kl. 19 á Hotel Føroyum. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 317136/269483 áðrenn 15. januar.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 9. februar 2007 hava Harriet og Jógvan Isaksen Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl 19. Tey ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf 455097 ella 215097 áðrenn 28. januar.

Leygardagin 13. januar 2007 hava Torstein & Sólrun Christiansen í Skálavík gullbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið, eru vælkomin í heimið á Hagabrekku 7 millum kl. 10-14.

**75 ár**
Hósdagin 11. januar verður Dávur Højgaard á Toftum, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**90 ár**
Hósdagin 11. januar verður Astrid á Dul, Tórshavn 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í Pállstovu kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.